# Nýggj kirkja uttan eitt oyra í almennum stuðli

**- Tað er hugvekjandi fyri ein landsstýrismann í mentamálum at síggja og uppliva, at ein samkoma kann fremja eitt slíkt mentunarligt verk og ein slíkan bygning, uttan eitt oyra í almennum stuðli, segði Jógvan á Lakjuni, tá fríkirkjan Oasan varð vígd leygardagin**

SAMKOMUR
*Snorri Brend*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

Hoyvík: Nýggja fríkirkjan Oasan slapp veruliga at standa sína roynd, nú hon varð vígd um vikuskiftið.

Fríggjakvøldið varð skipað fyri gospelkonsert, har ein fullsett høll lurtaði eftir trimum bólkum, sum bóru fram sangir sínar.

Seinnapartin leygardagin var so sjálv vígslan á skránni, har høllin enn einaferð var fullsett av fólki, sum ynsktu at vera við hesa løtuna, nú nýggja kirkjan skuldi takast í nýtslu.

Og henda kirkjan skal verða brúkt, og er longu nógv í brúki. Nærum hvønn einasta dag er okkurt andaligt tiltak á skránni í og út frá samkomuni.

Til sjálva vígsluna hevði samkoman boðið bæði býráðs- og landspolitikkarum. Við til vígsluna varð eisini boðin landsstýrismanninum í mentamálum, Jógvan á Lakjuni at halda talu.

Umframt hesar persónar vóru í hópatali av fólkum samankomin. Tey, ið ikki høvdu møguleika at vera á staðnum, kundu kortini fáa alt við umvegis útvarpsrásina Lindina, sum sendi beinleiðis frá vígsluni.

## Gróðrarblettur

Jógvan á Lakjuni fegnaðist um nýggju kirkjuna og ikki minst navnið "Oasan", sum hann helt vera sera væl valt. Hetta orðið er ikki til á føroyskum og heldur ikki finst nøkur oyðimørk her á landi.

- Men orðið sjálvt merkir ein gróðrarblettur í oyðimørkini, og tað er ein vøkur lýsing av tí virkseminum, sum tit standa í. Higar kunnu nevniliga koma fólk sum eru móð, troytt og tyst. Og her kunnu tey eisini fáa sløkt tann andaliga tostan.



*Umframt talur og sang, luttók eisini dansibólkurin Saltið við eini dansiframførslu, sum hugtók tey 500 fólkini í salinum*

- Her finst tað livandi vatnið, og hvør tann sum drekkur av hesum livandi vatninum skal ikki tysta aftur. Nú fáa tit so, í hesum nýggja og stásiliga bygninginum, loyvi til at peika á høvuðskelduna – Jesus – sum heimsins frelsara, segði hann.



*Høllin var nærum fullsett til vígsluna leygardagin, bæði av politikkarum og fólkum úr øllum samkomum í Føroyum.*

## Visjón og eitt mál

Eftir at virksemið byrjaði í húsinum í juni mánaði, var løtan nú komin, har hesin stásiligi bygningurin skuldi vígast.

Frammanundan var gjørt eitt stórt arbeiðið við at fáa alt til vega í húsinum. Og tá fólk komu í stóra møtisalin henda leygardagin, var alt klárt til ta hátíðarligu løtuna, sum ein slík vígsla altíð er.

Eini 500 fólk vórðu hesa løtuna vitni til, at ein lutvíst fáment samkoma hevur fingið sær so góðar karmar til virksemið sítt, og sum nógv kanska bara droyma um.

Hetta kundi fyristøðumaðurin, Jóni Johannesen eisini fegnast um í talu síni. Hann greiddi í stuttum frá, tá hesi møtini byrjaðu í 1981 og fram til dagin í dag, nú tey kundu taka sín egna kirkjubygning í nýtslu.

- Tað vóru tíðir, tá vónin um at fáa eitt slíkt hús ikki júst var tann størsta. Men tá vit so fingu sett visjónirnar og málini fyri eina slíka kirkju, tá byrjaðu ting at henda.

- Og nú hava vit so umsíðir fingið ein stásiligan bygning, beint við fótin av størstu útstykkingini á Føroya landi. Okkara vón er tí, at vit kunnu gera eitt andaligt arbeiði millum fólkið her á staðnum, men eisini út um alt landið og út um landoddarnar, segði Jóni Johannesen m.a. í talu síni.

## Offurvilji og samstarv

Jógvan á Lakjuni vísti eisini sína stóru virðing fyri tí verki, sum henda samkoman longu hevur lagt fyri dagin, og sum fer at sermerkja arbeiðið í framtíðini.

- Henda fríkirkjan kostar millum 8 og 9 mió. kr., og uttan offurvilja, visjónir og gott samstarv, var ein ongatíð komin á mál við bygginini.

- Endamálið við arbeiðinum er at náa menniskju við gleðiboðskapinum. Og ynskið er tí eisini, at gera hetta til eitt andaligt heim, - eitt heim har bæði børn, ung og vaksin kunnu koma saman og kenna tað sum sítt egna, segði Jógvan á Lakjuni, sum sjálvur er vaksin upp í eini fríkirkju í Fuglafirði.

Hann legði dent á, at í øllum samkomum – eisini eini slíkari sum Oasuni - finnast einstaklingar sum gera eitt stórt og trúfast andaligt arbeiði. Tey gera ikki so nógv um seg, men vit hava øll nógv at takka teimum fyri.

- Nú ræður um hjá tykkum at halda dampinum uppi. Tað er so skjótt at ein kann falla í fátt.

- Men við tykkara visjón og við at vera ein oasa - ein gróðrarblettur - kunnu tit vera tað staðið, har fólk kann fáa sín andaliga tosta sløktan og síðani vaksa bæði andaliga og sálarliga, segði Jógvan á Lakjuni í talu síni.

# Mentamálaráðharrin fór til klaverið

Ofta er tað so at tað spontana og tað undrunarverda er tað, sum fólkinum dámar best. Og tað var júst hetta sum fólk upplivdu henda seinnapartin í Oasuni.

Jógvan á Lakjuni var boðin at tala til vígsluna, og tað gjørdi hann bæði gott og víst.

Hann tosaði um týdningin av eini oasu í eini oyðimørk, og dró her paralellir við ta kelduna við Lívsins Vatni, sum ongatíð verður tóm og har tann, ið drekkur av henni ongatíð verður tystur aftur.

- Júst hetta kemur so væl fram í sanginum "Við krossin tín, o Jesus", sum eg fari at lesa upp. Nei, eg haldi bara, at eg syngi hann!, segði Jógvan.

Aftanfyri hann stóð klaverið klárt, og við síni vøkru rødd sang hann øll ørindini í hesum sanginum, til miklan fagna frá fólkinum í salinum og teimum sum lýddu á gjøgnum útvarpsrásina Lindina.

Tað eru helst ikki mangir aðrir mentamálaráðharrar, ið gera honum henda kunstin eftir!



*Jógvan á Lakjuni hevði frímóð og rødd til at syngja ein góðan og vælkendan sang undir vígsluni. Eitt frískligt innslag, sum fólki eisini dámdi sera væl*

## Hetta hendir í Oasuni

Nærum hvønn dag í vikuni er okkurt á skránni í og út frá Oasuni í Hoyvík:
Sunnudag: Gudstænasta kl. 11 ella evangeliskt møti kl. 18, og sunnudagsskúli kl. 14
Mánadag: Barnakór kl. 17:15 og bønarmøti kl. 20
Týsdag: Sellubólkar kl. 20
Mikudag: Bønarmøti kl. 7, dansibólkurin Saltið kl. 18 og sellubólkar kl. 20
Hósdag: Ungdómsbólkurin kl. 20
Fríggjadag: After Eight kl. 20